

# Skjótt 2000 útlendskir oljuarbeiðarar í Hetlandi

**Jan Müller**

01.03.2015 - 03:13

Oljan.fo

Hetland hevur havt sanna innrás av útlendskum oljuarbeiðarum nú í fleiri ár. Hetta hevur samband við stóru gassútbyggingina hjá franska oljufelagnum Total. Í løtuni eru umleið 1400 útlendingar til arbeiðis í Sullom Voe, har stór gassverksmiðja verður bygd. Men tá útbyggingin kemur í hæddina í næstum verða har meira enn 2000 oljjuarbeiðarar knýttir at gassverktætlanini.

Neyðugt hevur verið at leiga fleiri hotellskip til at hýsa arbeiðsfólkunum, og nú um dagarnar kom enn eitt hotellskip til Lerwick, tað 170 metrar langa SNAV Toscana, skrivar Shetland Times. Pláss verður fyri 500 oljuarbeiðarum umborð á hotellskipinum, sum er komið til hetlendska høvuðsstaðin. Við hesum skipinum eru ikki færri enn fýra hotellskip í havnini í Lerwick.

Stóra verkætlanin, sum hevur verið í gongd nú í fleiri ár, er vorðin nógv seinkað og hevur harvið eisini kostað fyritøkuni, sum stendur fyri arbeiðinum, Petrofac, stórar upphæddir. Tí ynskir felagið at fáa arbeiðið liðugt skjótast til ber. Málið er triði ársfjórðingur í ár, onkur sigur í juli og onnur september.

Myndir: Shetland Times, Paul Mohr oo.








